

*Væntandi er, at nógvar skipsmanningar fara at leggja seg tungt á endan, nú so nógvir ferðaseðlar eru at vinna Mynd: Føroya Sjómannadagur*

# Sterkasta manning togar seg til Íslands

**TOGTOGAN** Tá skipsmanningar fara at togtogast á stóra palli í Klaksvík leygardagin, verður høvi at vinna upp til 12 ferðaseðlar við Norrønu til Íslands

Vilmund Jacobsen

Fyri at gera kappingarnar á Føroya Sjómannadegi enn meiri attraktivar, verða í ár góðir vinningar latnir teimum sum vinna. Allir vinningarnir eru gávur, sum fyritøkur og stovnar hava latið ókeypis til endamálið.

Ein orsøk til, at vælvildin er so stór, er ivaleyst, at hesin dagur er ókeypis – og alkoholfríur, um vit so kunnu siga. Foreldrum nýtist ikki at ganga og renna við mappuni í hondini og geva børnunum pening, um tey hava hug at síggja ella royna okkurt. Allar kappingar, tiltøk og framsýningar eru ókeypis.

Sjómannadagurin er soleiðis ein rættiligur familjudagur.

Vinningarnir í ymisku kappingunum eru eisini ymiskar, men talan er um góðar vinningar.

### Stórur áhugi

Togtogan millum skipsmanningar er ein av vælumtóktu liðkappingunum á sjómannadegnum. Hendan verður á stóra palli leygardagin klokkan 14.30.

Í ár letur Smyril Line ferðaseðlar til eina heila skipsmanning – ella upp til 12 ferðandi - sum ókeypis sleppa við Norrønu til Íslands og heimaftur.

Togtogan hevur stóran áhuga millum áskoðarar, og nógv fólk plaga at fylgja gongdini, tá kappast verður um, hvør bátur ella hvat skip hevur sterkastu manning.

Átta mans skulu verða á hvørjum enda í kappingini.

### Tríggjar ferðir Ágot

Ymiskar skipsmanningar hava undanfarin ár vunnið kappingarnar í togtogan, men ein manning, sum tríggjar ferðir er farin avstað við sigrinum hesi árini, er manningin á línuskipinum Ágot.

Sum skilst, er væntandi, at manningin á línuskipinum Jákupi B eisini verður tung at syfta – og lítil ivi er um, at aðrar manningar so sanniliga eisini fara at leggja seg tungt á togendan, nú so nógvir ókeypis ferðaseðlar eru at vinna.

vilmund@sosialurin.fo

> ... vit vænta, at standmyndin verður tikin við sum heimsmet í Guinnes...
>
> JOHN WILLIAM JOENSEN



# Avdúka heimsins størsta í Klaksvík

**STANDMYND** Hósdagin klokkan 17 verður nýggj standmynd avdúkað í Klaksvík. Tey, sum standa aftanfyri Føroya Sjómannadag, siga, at standmyndin er av heimsins størsta – av sínum slagi, men tey vilja ikki siga, hvat motivið á standmyndini er. – Tað fer at bíða, til almenna avdúkingin verður, siga tey

Vilmund Jacobsen

Hóast Føroya Sjómannadagur fyrstu ferð varð hildin í Klaksvík í 2005 og tískil ikki hevur so mong ár á baki, hevur tiltakið kortini reist nakrar standmyndir, sum prýða um í okkara fiskivinnuhøvuðsstaði.

Við Magn-støðina í býnum er standmynd av egnara sum ber línustamp, og á gamla fiskastykkinum hjá Kjølbro er standmynd av tveimum fólkum, sum bera saltfisk.

### Stórur spenningur

Aftur í ár fer Føroya Sjómannadagur at avdúka eina nýggja standmynd, og hesaferð er forvitni ikki minni, enn tað hevur verið áður.

Tey, sum standa aftanfyri sjómannadagin, hava enn ikki avdúkað, hvat motivið á nýggju standmyndini er. Hetta verður ikki almannakunngjørt fyrr enn í morgin klokkan 17, tá standmyndin alment verður avdúkað.

Men spenningurin og forvitni eru stór – ikki minst tí, at henda standmyndin er rættiliga stór, heilar seks metrar høg!

Einasta, sum John William Joensen, ein av fyrireikarunum av Føroya Sjómannadegi, vil siga, er, at "standmyndin er av heimsins størsta - av sínum slagi..."

- Vit hava sent tekningar og aðra kunning til tey, sum standa aftanfyri Guinnes Record, og vit vænta, at standmyndin verður tikin við sum heimsmet av sínum slag, sigur hann.

### Portur til Klaksvík

Nýggja standmyndin, sum Føroya Sjómannadagur reisir í Klaksvík, fer at standa á rundkoyringini við Borðoyarvík.

John William Joensen sigur, at standmyndin er gjørd eftir tekningum hjá upprunaliga framleiðaranum, men bara í nógv størri vavi.

- Tað er smiðjan Skarðenni við Borðoyarvík, sum hevur gjørt arbeiði eftir tekningum, meðan spesialarbeiði og finpussingin eru gjørd í Danmark, sigur hann.

Hann leggur aftrat, at nýggja standmyndin verður lykilin ella portrið til Klaksvíkina, tá fólk koma úr Norðoyatunlinum.

- Vit kunnu siga, at hetta er ein standmynd, sum er givin av fólkinum til fólkið, sum John William Joensen málber seg.

### Skrá fyri avdúking

Tá stóra standmyndin verður avdúkað í morgin klokkan 17, fer Klaksvíkar Hornorkestur at seta sín dám á.

Tað verður Eivind Niclasen, fyrrverandi fiskimaður og reiðari, sum saman við borgarstjóranum, Gunvá við Keldu, alment fer at avdúka standmyndina.

Niclas Heri Joensen, sum saman við Olivuri Joensen var ein av stigtakarunum til Føroya Sjómannadag, fer at halda røðu, og Eyðstein Poulsen, sum eisini umboðar sjómannadagin, fer at greiða